## DAGSINS MEINING

# Suðuroyarætlan

Í blaðnum í gjár kemur suðuroyartingmaðurin Johan Dahl inn á nakrar sera áhugaverdar spurningar í sambandi við hetta fyribrigdið, at Suðuroyggin verður so hart rakt, hvørja ferð eitt búskaparligt nos fer um landið. At so er stendst av, at nakrar ávísar fortreytir heilt einfalt mangla í Suðuroy. Vist verður á tørvin á almennum arbeiðsplássum og á trupulleikar við logistikkinum ella við øðrum orðum á tað vánaliga ferðasambandið.

Vit skulu ikki her gera viðmerkingar til tey áhugaverdu hugskotini, sum verða luftað í greinini "Suðuroyggin má gerast eitt kraftsentur", men bert mæla øllum samfelagsáhugaðum til at lesa greinina. Hinvegin er eitt hugskot, sum sera varisliga verður umrøtt í nevndu grein, sum vit halda er sera áhugvert. Hetta hugskot snýr seg um ein regionalan grunn fyri Suðuroynna. Nú er alt, sum eitur almennur stuðul til vinnuliga menning vorið eitt ókvæmsorð í Føroyum. Tann, sum dittar sær at nevna hendan møguleika, verður alt fyri eitt settur í bás, sum ein av teimum, ið vil reka Føroyar aftur í áttatiárini. Soleiðis er nú tað.

Men hesin spurningur er ikki so einfaldur. Líta vit út um landoddarnar t.d. at europeiska búskaparlokomotivinum ES, so síggja vit, at grunnar av øllum sløgum verða nýttir sum búskaparligir kveikar og sum menningaramboð. Vit síggja, at stuðul verður latin til fleiri vinnur, og at hetta verður gjørt við góðum úrsliti. Sum dømi kunnu verða nevnd filmsídnaður og økismenning. ES hevur tungar regionalar grunnar, sum hava gjørt almikið gagn fyri útjaðaraøki í samveldinum. Hví kunnu vit so ikki hava ein føroyskan regional- ella økismenningargrunn? Vit hava jú roynt nakað av hesum við tí sonevndu Sandoyarætlanini, sum í roynd og veru var ein miniregionalgrunnur. Henda skipan var ein treytaleys succes. Samgongan eigur av álvara at taka trupulleikarnar hjá Suðuroynni upp til álvarsama politiska viðgerð. Í hesum sambandi eigur at verða gjørd ein Suðuroyarætlan, samstundis sum stovnaður verður ein sterkur regionalgrunnur við tí endamáli at fáa Suðuroy búskaparliga aftur á føtur. Ætlanin eigur at fevna um innankervið t.v.s. nógv betri ferðasamband í oynni og millum oynna og restina av landinum og útheimin, útbúgving, mentan, vinnulív, broyttan kommunubygnað, ungdómstilboð o.m.a. Við eini slíkari ætlan kundi Suðuroyggin blivið til tað kraftsentur, sum verður eftirlýst í nevndu grein, og sum øll væl ynskja.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Málsmiðir – álvaratos!

**Jústinus Leivsson Eidesgaard**



Føroyska málið líðir last av teimum sum misbrúka tað, og viðhvørt serliga av teimum sum í bestu meining royna at bøta upp á tað.

Í Sosialinum týsdagin nakað aftan fyri síðuna, har »Todøe« fekk sína Andreu, síggja vit mynd av dámligum kvinnum. Hetta eru teir fyrstu nemingar-námsfrøðingarnir. Haaa!

Nemingarnámsfrøðingarnir. Her er 24 bókstavir í orðinum, og tað kunnu vit so ikki kalla fyri liðiligt og snøgt orðasmíð. Hví ikki kalla yrkið hjá hesum kvinnum fyri neming og kvinnunar fyri nemingar. Stutt og greitt og sigur júst hvat tað snýr seg um. Lat síðan kundan ella sjúklingin avgera um tær eru serfrøðingar ella ikki.

Bløðini fáa ofta skotið í skógvarnar, hvussu vánaliga tey handfara málið. Tó erligt talt, hvussu skulu vit journalistar í eini yvirskrift handfara orðið nemingarnámsfrøðingar. Hetta orðið er so klossut, at tað sleppur ongantíð í eina høvuðsyvirskrift, um so allir nemingarnámsfrøðingar á norðaru hálvu doyðu samhaldsfast fyri egnari hond.

Eg veit ikki, hvør er komin við hesum námsfrøðingunum í føroyska málið. Eg verið altíð mintur á kolanám og svartar kolanámsserfrøðingar, tá eg síggi hetta orðið. Tá eg gekk í skúla á Strondum fyri 30 árum síðan var hetta orðið ikki til, ikki har inni í hvussu er.

Síðan Florence Nightengale gekk við lampuni í Krimkrígnum fyri 150 árum síðan, hevur vakra orðið sjúkrasystur verið vørumerki fyri umsorgan og kærleika hjá sjúkum.

Nú eru sjúkrasystrarnar deyðar, og vit hava fingið sjúkrarrøktarfrøðingar. Ja tit lesa rætt, 22 bókstavir skuldu til fyri at finna eitt annað orð fyri snøgga og sigandi orðið sjúkrasystir. Ja og sjúkrarøktarfrøðingurin er væl bara stovnurin í orðinum. So koma heitini afturat, fyri at vit kunnu skilja hvønn sjúkrarøktarfrøðing talan er um. Á landssjúkrahúsinum munnu so eisini finnast doyvingarsjúkrarøktarfrøðingar og deildarsjúkrarøktarfrøðingar og í vanligari tala mugu vit eisini røða um serdeildarsjúkrarøktarfrøðingar, ja, og her í seinasta orðinum vóru 31 bókstavir.

Er orðið sjúkrasystur ikki nóg gott, lat okkum so stytta tað niður í systur. Eitt orð, sum vísir til umsorgan og kærleika, og tað er væl tað sum verður høvuðsyrkið hjá sjúkrasystrunum framyvir. Bretar brúka stutta orðið »nurse«.

At seta orð saman til tú hevur fingið tað við, sum heitið fevnir um, er ikki orðasmíð. Orðasmíð er at smíða nýggj orð, og tí kundi orðið bøga eins væl verið nýtt, tá talan er um umsorgan fyri fólki. Bøga, eitt heitt og fjálgt orð.

Sjálvur er eg fegin um mítt starvsheitið sum journalistur ella kanska skjótt rithøvundur. Um eg eri serjournalistur ella serrithøvundur, tað lati eg lesaran um.

Betur er bøtandi hond enn spillandi tunga.

# Teistin

**Palli Dalsgaard**



Nú er komið væl í fjórðu viku, síðani bógportrið á Teistanum bleiv í ólagi og ikki kann nýtast. Av tí sama mugu bilarnir bakka upp á land, tað er bæði tvørligt og ikki sørt vandamikið. Serliga uppi á bryggjuni, tá allir hesir bilarnir koma eftir hæli upp í millum tað rúgvuna av fólki, ið kemur úr skipinum, og tey, ið skulu umborð aftur, tá tómt er blivið.

Hetta brekið hevur verið á bógportrinum áður, men hevur ongantíð tikið so langa tíð at fingið rættað sum hesaferð.

Hví hendir einki? Er tað líkasæla, ella er eitt portur sett í skipið frá fyrstan tíð, ið er óbrúkiligt? Her má koma ein loysn við tað sama, tí núverandi støða kann ikki halda fram.

Tað hoyrist at eitt mansskap skal setast afturat umborð á Teistan, tí hann skal fara at sigla um kvølið eisini. Er tað ikki ov nógv fyrilagt í hesum niðurgangstíðum? Eitt vita vit, tað verður ikki nógv at sigla við um kvøldið. Tá var líka frægt, at skipið gjørdi eykatúrar, tá nakað var í høvuðsstaðnum, sum tey ungu høvdu huga at fara til.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Rúna Sivertsen runa@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen hans@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]


**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støddr:**

Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**

Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



Havnar Jazzfestivalur:

# Full ferð framá

**Við eini stórari konsert í Norðurlandahúsinum týskvøldið varð skjøtil veruliga settur á stóra jazzfestivalin, sum er í Havn í hesum døgum. Bæði føroyskir og útlendskir tónleikarar luttóku á konsertini**

JAZZFESTIVALUR
*Orð: Ingrid Bjarnastein*
*Myndir: Jens Kr. Vang*



*ENEKK: Agnar Lamhauge á kontrabass og Kári Sverrison, forsangari*

Í hesum døgum er stórur jazzfestivalur í Havn. Byrjunarskotið varð latið av mánakvøldið, tá Spælimenninir spældu niðri í Vertshúsinum, men sigast kann, at skjøtil varð rættiliga settur á festivalin týskvøldið, tá stór konsert var í Norðurlandahúsinum.

Ikki færri enn fimm nøvn vóru á skránni til konsertina. Enekk, Spælimenninir, Kannaste-Ojajarvi Quartet, Eivør Pálsdóttir og New Jungle Orchestra.

### Erligu Enekk

Enekk settu hol á konsertina, og fingu teir enn einaferð prógvað, at teir eru ein fantastiskur bólkur. Ikki minst til live-framførslur.

Teir borðreiddu við einum cocktail av føroyskum fólkajazzi og etniskum rútmum serverað við hugleiðandi filosofiskum yrkingum.

Teirra erliga spæl og hugtakandi og erligu tekstir sláa ikki feil. Kári Sverrisson megnar at vera frontmaður í bólkinum, uttan veruliga at vera tað. Hann kann tykjast smæðin, men samstundis heldur hann seg ikki aftur. Tá hann er komin á pallin er hann til staðar við lív og sál, eins og hinir limirnir í bólkinum.

Konsertin varð soleiðis skipað, at skift varð ímillum Klingruna og konsertsalin. Soleiðis slapst undan tí stóru bíðitíðini hjá áhoyrarunum, sum millum hølisskiftini fingu samstundis fingu strekt sær beinini.

### Leikandi lætt

Spælimenninir, sum bólkurin kallar seg, eru mannað við fólki úr Føroyum, Danmark og Svøríki. Við Kristiani Blak á odda undirhildu tey við spælimannaløgum og traditionellum løgum.

Tað skerst ikki burtur, at tey við sínum lætta tónleiki bæði nýttu at spæla. Samstundis fingu áhoyrarnir ein smakk av veruligum spælimannatónleiki kryddaðum við løttum violin- og floytuspæli, meðan fingrarnir hjá Kristiani Blak dansaðu so leikandi lætt yvir klaverið.

Annað av útlendsku nøvnunum týskvøldið vóru finsku Kannaste-Ojajarvi Quartet.

Tvær saxofonir, ein kontrabass og trummur. Teir spældu tungan, myrkan jazz.

### Einastandi Eivør

Í Klingruni setti Eivør sín serstaka dám á konsertina. Týskvøldið fingu áhoyrarnir ein blanding av svenskum, føroyskum, enskum og íslendskum tónleiki. Meginpartin hevði hon skrivað sjálv, men eisini var okkurt lag, ið hevði annan uppruna.

Berføtt megnaði gøtukvinnan enn sum einaferð at bergtaka áhoyrararnar. Røddin fylti skjótt Klingruna og við gittarspæli og einum stórum smíli hevði hon skjótt publikum í hond síni.

New Jungle Orchestra úr Danmark settu punktum fyri konsertini týskvøldið. Talan er um ein jazzbólk, ið er mannaður við heili 10 persónum.

Fyri óvanda jazzoyrað var nógv at halda skil á. Blásiljóðføri, klaver, gittar, trummur og percussion sendu út eina suppu av tónum, ið til tíðir var bæði undirhaldandi og álvarsamt.

Rái pallurin, ið var karmur um konsertsalin, var brúktur allur sum hann var, og eisini áhoyraranir sluppu at uppliva tónleikararnar heilt tætt uppá, tá teir í finaluni fóru spákandi ein túr millum lurtararnar við teimum ljóðførunum, ið berast kundu.

Jazzfestivalurin setti við konsertini týskvøldið kósina. Nú er full ferð framá í eini viku fullari av tónleiki. Nevnast kann at enda, at í kvøld, hóskvøldið verður millum annað ein konsert í Sjónleikarahúsinum við RUN, Hanus G. Johansen og Nicholas Hill and The Universals. Síðstnevnda orkestur spældi annars á gongugøtuni seinnapartin týsdagin.



*EIVØR: Hesuferð fingu áhoyrararnir ein blanding av íslendskum, enskum, føroyskum og svenskum tónleiki*



*KANNASTE-OJARVI QUARTET: Annað av útlendsku nøvnunum týskvøldið varð úr Finlandi*



*SPÆLIMENNINIR: Fingrarnir hjá Kristian Blak dansaðu leikandi lætt yvir klaverið*